# Grein 19 frágreiðingin ongar avleiðingar

**Øll viðurskiftini, sum eru nevnd í frágreiðingini hjá grein 19 nevndini eru fyrnað, og tí kann eingin dragast til svars fyri tey. Rættarnevndin mælir løgtinginum til at taka frágreiðingina til eftirtektar.**

GREIN 19 FRÁGREIÐINGIN
*Magnus Dam*

Rættarnevndin hjá løgtinginum tekur undir við uppskotinum frá formansskapinum, sum mælir løgtinginum til at taka frágreiðingina um áttatiárini til eftirtektar. Nevndin legði týsdagin álit fyri løgtingið, eftir at hon hevur viðgjørt frágreiðingina á fýra nevndarfundum.

Nevndin hevur í sínari viðgerð umrøtt, um rættarlig stig skulu takast móti einstaklingum, og um politisk stig skulu takast móti persónum, sum sita í almennum álitiisstørvum, men niðurstøðan er, at eingi stig kunnu takast nú.

– Øll málini, sum viðgjørd eru í frágreiðingini, eru fyrnað, og tí er ikki grundarlag fyri at fara rættarliga vegin við nøkrum av teimum, og hevur nevndin tikið tað til eftirtektar, stendur í álitinum frá rættarnevndini. Tað, at fyrningarfreistin er farin, útilokar tí bæði at gera rættarliga ábyrgd galdandi og møguleikan hjá umrøddu persónunum at verja seg, leggur nevndin afturat.

Grein 19 nevndin kom til somu niðursøðu í rúgvismiklu frágreiðingini, sum hon lat úr hondum í november í fjør.

– Neyvan er grundarlag fyri aðrari avleiðing vegna heimildarloysi enn, at tað harðliga verrður funnist at veiku, tilvildarligu og ófullfíggjaðu politisku og umsitingarligu støðuni í 80-árunum. Stórt eftiransni eigur at verða víst á løggávuøkinum hereftir, skrivar grein 19 nevndin, og hesari orðingini tekur rættarnevndin undir við.



*Frágreiðingin hjá grein 19 nevndini, sum her verður handað løgtingsformanninum, fær ikki rættarligar avleiðingar fyri nakran. Øll tey umrøddu málini eru fyrnað.*

### Gongur rætta vegin

Rættarnevndin skrivar í álitinum, at ávís stig eru tikin rætta vegin, hvat viðvíkur løggávu og ábyrgdarbýti í hesum samanhangi. Men ikki nóg nógv stig, heldur nevndin.

Rættarnevndin heitir tí á landsstýrið um at taka stig til, at øll løggáva, sum kann føra til somu mistøk, verður endurskoðað við tí fyri eyga at binda um heilan fingur. Somuleiðis skulu gerast fyrisitingarligar reglur, sum byggja uppundir sama málsetning.

– Nevndin heldur tað vera týdningarmikið, at skeivleikar og mistøk, ið eru gjørd, verða ikki gloymd, men verður lærdómur fyri eftirtíðina. Um so er, hevur grein 19 frágreiðingin loyst eina týðandi uppgávu, stendur at enda í álitinum frá rættarnevndini.

# Brimil komin í løgtingið

**Ósemjan millum manningarfeløgini og Fíggjarmálastýrið um Brimil er nú løgd fyri løgtingið. Sambært uppskotinum skal ein nevnd umboðandi allar partar loysa ósemjuna.**

BRIMIL
*Magnus Dam*

Ein nevnd mannað við seks fólkum skal nú royna seg í ósemjuni millum Fíggjarmálastýrið og manningina á Brimli. Karsten Hansen, landsstýrismaður, legði týsdagin uppskot fyri løgtingið um at seta eina seksmannað nevnd at finna eina semju millum partarnar.

Fíggjarmálastýrið skal velja tríggjar av limunum í nevndina, og Skipara- og navigatørfelagið, Maskinmeistarafelagið og Starvsmannafelagið velja tríggjar nevndarlimir.

Nevndin skal loysa ósemjuna innan 1. mai í ár, og inntil tá verður Brimil bólkaður eins og Tjaldrið. Tað vil siga, at limirnir í feløgunum skulu fara til arbeiðis umborð á Brimli beinanvegin, tá uppskotið er samtykt, og lønarviðurskiftini verða so skipað eins og umborð á Tjaldrinum.

Kemur nevndin til ta niðurstøðu, at manningin á Brimli skal hava onnur lønarviðurskifti enn manningin á Tjaldrinum, so skal lønin skipast samsvarandi avgerðini hjá nevndini við afturvirkandi kraft.

Tekur ósemja seg upp um ymisk viðurskifti í nevndini, so skal nevndin útneva ein ástøðumann, sum tekur endaligu avgerðina. Kunnu limirnir ikki semjast um, hvør skal vera ástøðumaður, so skal sorinskrivarin velja ástøðumannin.

### Hevur skund

Tað hevur skund at finna eina loysn á ósemjuni, og ikki minni skund hevur tað at faá nýggja vaktarskipið í tænastu. Fiskimálastýrið sigur í einum skrivi til Fíggjarmálastýrið, at tað er avgerandi, at tænastan fæst at virka nú.

– Øll eftirlitstænastan og sjóbjargingin stendur uppá spæl, nú vártíðin nærkast, og aktiviteturin er vaksandi, samstundis sum nógv útlendsk skip eru byrjað at fiska í føroyskum sjógvi aftur, skrivar Fiskimálastýrið millum annað í skrivinum.

Fíggjarmálastýrið sær ongan annan útveg, enn at løgtingið nú leggur uppí málið. Allar samráðingarroyndir higartil eru miseydnaðar, og tí er neyðugt at løgtingið setur eina nevnd at loysa trætuna.
Starvsmannafelagið hevur mótmælt, at tað verður drigið uppí ósemjuna. Felagið er misnøgt við at skula velja umboð í nevndina, tí felagið hevur ikki noktað sínum limum at arbeiða umborð á nýggja vaktarskipinum.

Men Fíggjarmálastýrið heldur tað vera rættast, at lønarásetingar fyri manningina verða viðgjørdar í eini heild, og tí er Starvsmannafelagið eisini umfatað av uppskotinum.

Løgtingið fer helst at viðgera uppskotið frá Karsten Hansen á tingfundinum í dag ella í morgin.



*Ein nevnd mannað við seks limum skal nú royna at finna eina loysn á lønarósemjuni um Brimil.*



# Politiið eyguni eftir heimasíðu

**Við internetinum hevur løgreglan fingið ein nýggjan trupulleika. Hvørja mannagongd skal hon nýta, tá talan er um lógarbrot á internetinum? Enn trilvar løgreglan seg fram, tí ongar serligar lógir eru gjørdar viðvíkjandi internetinum. Ein ungur drongur úr Søldarfirði hevur eina heimasíðu, har hann leggur út myndir frá konsertum, sum onkur hevði kallað óhóskandi, og løgreglan setti seg í samband við hann um at rudda upp á síðuni**

HEIMASÍÐUR
*Stefan í Skorini*



*Á heimasíðu á internetinum ber til at síggja myndir frá konsertum og diskotekum, har ungdómar stuttleika sær. Spurningurin er, hvørt tað er lógligt at almannakunngera slíkar myndir á netinum*

*Tilgjørd mynd*

17 ára gamli Petur Hansen úr Søldarfirði hevur saman við vinmanni sínum, Inga Petursson, eina heimasíðu á internetinum. Adressan er www.ung.as. Henda síðan er ómetaliga væl umtókt millum tað unga fólkið, og síðan hevur havt nógvar vitjanir hvønn dag.

– Okkara síða hevur eini 400 vitjanir um dagin, og talið er heldur meira, tá nýggjar myndir júst eru lagdar á síðuna, so henda síðan er ógvuliga væl dámd millum ungdómar. Haraftúrat hava vit nú eini 350 skrásettar brúkarar av síðuni, sum senda post sínámillum á henni, og tað legst afturat hvønn dag, sigur Petur Hansen, sum stendur fyri hesi heimasíðuni.

Vitjar ein síðuna hjá Peturi ber til at klikkja seg inn á nakað kallað rapport. Har liggja myndirnar, sum Petur sjálvur hevur tikið. Til ber at velja ávís tiltøk, har myndir frá hesum konsertum ella diskotekum liggja.

Tær flestu myndirnar eru nærmyndir av fólki, so at tað ber til at kenna andlitini aftur á teimum. Hetta kunnu vera fólk, sum fríggja, dansa, drekka ella hvat annað fólk finnur uppá á konsertum og tílíkum, har nógv ung eru komin saman at halda sær á gleimi.

Fyriskipararnir av síðuni nokta heldur ikki fyri, at hetta er størsta orsøkin til, at síðan er so væl vitjað.

### Løgreglan tók málið upp

Í hesi vikunu setti løgreglan seg í samband við Petur viðvíkjandi heimasíðuni, tí onkur eftir øllum at døma hevur boðað løgregluni frá henni, tó uttan at melda. Løgreglumaðurin sigur, at samtalan teirra millum var “fortrólig”, og tí ætlar hann sær ikki at siga nakað nágreiniligt um hetta málið.

Løgreglumaðurin heldur tó, at teir, sum standa fyri síðuni, ikki hava skilt, hvørjar myndir ein kann leggja á eina heimasíðu sum hesa, men kundi ikki vísa til nakra ávísa mynd, sum kanska kundi verið lógarbrot at almannakunngera. Hann vísti til bløðini, sum hann metti høvdu okkurt slag av reglum á hasum økinum.

Løgreglan upplýsir eisini, at hon onga melding hevur fingið viðvíkjandi síðuni, og tí er einki mál koyrandi í løtuni.

Petur sjálvur sigur, at hann fekk boð frá sýslumanninum í Eysturoynni um at ringja til løgregluna í Havn. Hetta gjørdi hann og prátaði við løgreglumann á støðini.

– Eg setti meg í samband við løgregluna, og fekk at vita, at eg skuldi seta meg saman við einum eldri persóni at rudda upp á síðuni. Eg fekk eina freist uppá eina viku at fáa tingini í rættlag, ella skuldi eg dokumentera allar myndirnar og hava undirskrift frá teimum, sum vórðu avmyndað. Eg fekk tó ongantíð at vita nágreiniliga, hvørjar myndir eg skuldi taka av, sigur Petur Hansen.

Petur sigur, at sum hann skilti støðuna, so kendi hann tað sum eina hóttan frá løgregluni um, at ruddaði hann ikki upp á síðuni, so fór tað at fáa avleiðingar fyri hann. Hann visti tó ikki, hvussu hetta skuldi fara fram.

Síðani setti pápi ein av dreingjunum seg í samband við løgregluna fyri at fregnast, hvat gerast skuldi, og tá hildu teir, at løgreglan trekti í land aftur, og ikki vildi siga nakað nágreiniligt um, hvat var ólógligt við síðuni.

– Onkur, sum eg kenni, hevur spurt meg, um eg ikki kann taka myndir av teimum avaftur síðuni, og tað havi eg so gjørt, sigur Petur.

Hjá teimum, sum vitja síðuna, ber til at skriva eitt teldubræv og boða frá, um ein vil hava eina mynd tikna avaftur.

Sum Sosialurin skilir, so er tað vanligt hjá ungum, sum hava verið í dansi, har myndir eru tiknar, at fara inn á hesa síðuna mánamorgun at kanna, um tey eru komin á onkra av myndunum, og tey halda tað vera stuttligt.

– Øll vita, hvat myndirnar skulu brúkast til, tá eg møti upp á konsert við myndatólinum hjá mær. Í meginparturin av myndunum, hava fólk beinleiðis poserað fyri at sleppa uppá myndirnar, sigur Petur.

Løgreglan sigur, at um onkur, sum er avmyndaður á síðuni, meldar til løgregluna, so verður eitt mál byrjað.

### Trilva seg fram

Georg Otthamar, varaleiðari á kriminaldeildini, sigur við Sosialin, at í løtuni trilvar løgreglan seg fram í slíkum málum, tí enn er internetið nýtt um allan heimin.

Tí er enn eingin mannagongd fastløgd á hesum økinum, men Georg sigur, at tað byrjar so spakuliga at vísa seg eitt mynstur.

Í Revsilógini stendur, at “den, som uberettiget fotograferer personer på et ikke frit tilgængeligt sted, kan straffes med bøde eller indtil 6 måneder fængsel”. Lógin sigur eisini, at tað er revsivert, at “videregive billeder, der åbenbart kan unddrages offentligheden”.

Georg Otthamar metir, at eitt dansihøli ella ein konsert ikki er “frit tilgængeligt”. Hann leggur tó dent á, at tað er upp til ein dómstól at døma í slíkum málum.

Spurningurin er so, um ein konsert er “frit tilgængelig” ella ikki, og er spurningurin er eisini um, hvat kan “unddrages offentligheden”.

Eitt stendur tó fast, at henda síðan er ein tann mest vitjaða føroyska heimasíðan, og tey flestu halda tað vera stuttligt, at sleppa við á hesar myndirnar, hóast tær verða almannakunngjørdar á netinum.

## Revsilógin

§ 264 d.59) Med bøde, hæfte eller fængsel indtil 6 måneder straffes den,
der uberettiget videregiver meddelelser eller billeder vedrørende en andens
private forhold eller i øvrigt billeder af den pågældende under
omstændigheder, der åbenbart kan forlanges unddraget offentligheden.
Bestemmelsen finder også anvendelse, hvor meddelelsen eller billedet
vedrører en afdød person.

§ 264 a) Den, som uberettiget fotograferer personer, der befinder sig på et ikki frit tilgængeligt sted, kan straffes med bøde eller indtil 6 måneder fængsel.